# Føroya kvøld á Skála

FØROYAKVØLD
*tíðindaskriv*



*Seinasta føroyakvøldið í røðini verður á Skála leygarkvøldið*

Í summar hevur verið skipað fyri føroyakvøldum í Eysturoynni. Undirtøkan hevur verið góð, kvøldini væl eydnaði og gestirnir sera væl nøgdir.

Komandi fríggjakvøld verður føroyakvøld í Bygdasalinum á Skála. Hetta er seinasta føroyakvøldið í Eysturoynni í ár. Á skránni verður eitt breitt úrval av føroyskum mati, so gestirnir fáa etið seg mettar og roynt ymiskan siðbundnan føroyskan mat. Ymiskt undirhald verður á skránni sum t.d. upplesnaður um føroyska samfelagið, søgu og mentan og felagssangur. Kvøldið endar við at Dansifelagið á Látrinum hevur eina dansiframførslu, har gestirnir eisini sleppa at royna stevið í føroyskum dansi.

Kvøldið byrjar klokkan 19.00, og kunnu atgongumerki keypast á Kunningarstovunum í Eysturoynni.

# Teitur og Sanne rocka á Rosenborg

**Leygarkvøldið hava føroyskir sjónvarpshyggjarar møguleika at síggja Teitur á palli saman við fleiri av størstu donsku tónleikanøvnunum**

KONSERT
*Jákup Mørk*



*Sanne Salomonsen og Teitur Lassen teljast millum nøvnini, sum fara á pallin á Rosenborg, tá stór Rock'n Royal konsert verður hildin leygarkvøldið*

»Rock på Rosenborg« verður av Danmarks Radio skýrt sum ein av stóru tónleikahendingunum í Danmark í ár. Talan er um eina konsert, sum skal markera 60 ára dagin hjá Red Barnet, og ágóðin av tiltakinum fer óskerdur til Rock'n Royal grunnin, sum verður umsitin av Red Barnet.

Sum navnið sigur, so skal tað sjálvandi eisini vera eitt sindur royalt, og tí fara Friðrikur Krúnprinsur og Mary Krúnprinsessa sjálvandi at teljast millum tey 7.000 áhoyrararnar, sum væntandi fara at vera til tiltakið.

## Millum tungu nøvnini

Á plakatini standa fleiri av størstu donsku tónleikanøvnunum. Sanne Salomonsen, TV-2 og Nikolaj Nørlund standa soleiðis ovarliga á listanum, men eisini føroyski Teitur, stendur skrivaður millum nøvnini, sum skulu spæla.

»Teitur fekk sítt altjóða gjøgnumbrot við tí vøkru og lágmæltu fløguni, Poetry And Aeroplanes, og setti við hesum Føroyar á rockmusikalska heimskortið«

Soleiðis verður sagt í formælinum til konsertina, og tað er einki at ivast í, at hetta tiltakið kann geva Teiti enn eitt skump rætta vegin á danska marknaðinum. Ikki minst tann sannroynd, at hann við hesum verður togaður upp á stóra pallin við teimum tungu nøvnunum kann styrkja um støðu hansara.

Leikluturin hjá Teiti á konsertini verður sum gestur hjá Nikolaj Nørlund. Hesin hevði til 200 ára dagin fyri H.C. Andersen sett sær fyri at gera eina fløgu, sum tók útgangsstøði í verkunum hjá H.C. Andersen, og til at framføra hesi, hevur Nørlund so boðið fleiri nøvnum, sum hann heldur hóska seg væl til júst hesa framførsluna. Og millum hesi nøvnini er so føroyski Teitur Lassen.

Konsertin verður send beinleiðis á DR1 leygarkvøldið klokkan 18.30.

# Vatnskaði steðgar virkseminum

**Eini 200 børn, sum hava sína dagligu gongd í Margarinfabrikkini í Havn hava nú einki stað at vera í henda komandi mánaðin. Ein vatnleki hevur gjørt so mikið stóran skaða, at neyðugt er at steingja hetta staðið, sum fyrr í ár varð høvuðsumvælt í samband við drotningsvitjanina**

VATNSKAÐI
*Snorri Brend*
*Myndir: Jens Kr. Vang*



*WC-kumman er brotnað, og vatnið er fossað út alla náttina, til miklan trega fyri starvsfólk og børn á Margarinfabrikkini*

Margarinfabrikkin: Tað var ein keðilig sjón, sum møtti starvsfólkunum í Margarinfabrikkini tíðliga gjáramorgunin.

Innkomin í arbeiðspláss teirra gjørdust tey var við, at vatn fleyt allastaðni, og at tað haraftrat rann vatn niður av loftinum, har ymiskir tónleikabólkar hava venjingarhøli síni.

Fá sekund seinni kundu tey staðfesta bæði staðið og orsøkina til vatnið. Og tey sóu eisini viðkomandi, sum uttan iva hevði forvolt henda rættiliga umfatandi skaðan.

Í eini sofu lá nevniliga ein maður og svav. Hann var sovnaður her eina ferð um náttina, eftir at hann fyrst hevði verið á wc.

Eftir at vera liðugur á wc'inum hevur hann helst ætlað sær út aftur, men mangt bendir á, at hann ikki heilt hevur funnið útav, hvønn veg hurðin gekk.

Hann er tí stigin upp á kummuna og er klatraður upp um wc-veggin, óvitandi um at kumman brotnaði orsakað av hesum, og óvitandi um, at vatn longu tá var byrjað at fossa út úr vatnrørunum til kummuna.

Tá so starvsfólkini komu til arbeiðis gjáramorgunin kundu tey bert staðfesta tann stóra skaðan, sum vatnið hevði framt um náttina.

## Óhepnir tónleikarar

Fyrrapartin í gjár byrjaðu fólk at rudda upp og tøma vatnið út. Síðani skulu umfatandi umvælingar gerast enn einaferð. Og hetta hendir stutta tíð eftir at Margarinfabrikkin var høvuðsumvæld til forkunnugu drotningavitjanina fyrr í summar.

Sambært leiðaranum, Boga Andreasen er ikki óhugsandi, at Margarinfabrikkin verður afturlætin í 3, kanska enntá í 4 vikur framyvir. Og hetta kemur helst illa við hjá teimum um 200 børnunum, sum við millumbilum vitja inn á hetta staðið.

Hesin skaðin kemur eisini sera illa við hjá teimum ymisku tónleikabólkunum, sum ofta hava nógva útgerð standandi - og liggjandi á gólvinum - í venjingarhølum sínum í Margarinfabrikkini.

Ein teirra – Makrel – skal í morgin til Danmarkar at spæla. Og um middagsleitið í gjár var eitt sindur óvist, hvussu nógv av teirra útgerð hevði fingið skaða orsakað av vatninum.

Skaðin á Margarinfabrikkini er tíbetur avmarkaður rættiliga nógv av tí eina skilavegginum, sum gongur allan vegin frá lofti til gólv í hæddini, har lekin byrjaði.



*Tey hava úr at gera við at rudda upp eftir stóra vatnskaðan um náttina. Neyðugt verður við enn eini høvuðsumvæling av hesum staðnum*